Atlanstflog fær tyrluflúgvingina

Atlantic Airways kann síggja fram til eina inntøku upp á 14 milliónir um ári › næstu tíggju árini. Ein samd vinnunevnd tekur undir vi› at gera sáttmála vi› felagi› um at røkja tyrlutænastuna fyri ta› almenna

TYRLUTÆNASTA
Magnus Dam

Tyrlutænastan skal vera á føroyskum hondum, og næstu tíggju árini ver›ur ta› føroyska flogfelagi›, sum fer at røkja alla tyrluflúgving í samband vi› fiskivei›ieftirlit, leiting og bjarging á sjógvi og landi og sjúkraflutning.

Vinnunevndin hjá løgtinginum tekur einmælt undir vi› uppskotinum hjá Jørgen Niclasen, landsst‡rismanni í fiskivinnumálum, sum hevur lagt fram uppskoti› um tyrlutænastuna.



Samd vinnunevnd tekur undir uppskotinum hjá Jørgen Niclasen, um at Atlantic Airways skal røkja tyrlutænastuna í eini tilbúgvingarætlan

Men nevndin er ikki øll líka samd. Me›an samgongutingmenninir taka undir vi› málinum uttan vi›merkingar, so hava andstø›uumbo›ini ávís fyrivarni.

Atfinningarsom andstø›a

Henrik Old og Dan R. Petersen úr Javna›arflokkinum taka undir vi› málinum, men ta› er mest orsaka› av, at einki alternativ fyriliggur til uppskoti›. Teir finnast í álitinum frá nevndini at mannagongdini í samband vi› máli›. Avger›in um, at sáttmáli skal gerast vi› Atlantic Airways er tikin, á›renn uppskoti› kom í løgtingi›, og ta› sama er avger›in um, hvat slag av tyrlu skal n‡tast til tænastuna.

Tyrlan, sum Atlantic Airways ætlar at keypa tekur 12 fer›afólk, men bert níggju í samband vi› bjarging, vísa tingmenninir á.

– Tá i› man veit, at tyrla ikki kann lenda á n‡ggja vaktarskipinum, so er minnilutin serliga ivingarsamur um, at tyrlan bara tekur níggju fólk í samband vi› bjarning. Á føroysku landlei›ini eru meira enn 30 skip, har manningin liggur millum 12 og 14 mans, vísa teir á. Og teir vísa eisini á, at ta› ver›ur trupult at koma afturumaftur seinni, tí talan er um ein 10 ára sáttmála.

Illa l‡st

Javna›artingmenninir taka kortini undir vi› málinum, og ta› sama ger Alfred Olsen, sum kortini eisini finst at fyrireikandi arbei›inum. Alfred Olsen heldur ikki, at landsst‡risma›urin hevur kanna› allar møguleikar og l‡st fyri løgtinginum, at talan í hesum førinum er um bestu og bíligastu loysnina.

– Eftir nevndarvi›ger›ina eru ta› framvegis vi›urskifti, sum eru ógrei›. Ta › veri› seg ognarvi›urskiftini til útger›ina, peningur er játta›ur til. Spurningurin um gó›kenning av tyrluni til leiting og bjarning. Vi ›urskifti vi›víkjandi bjargingarmanningini og trygdini fyri einari stabilari tænastu, sigur Alfred Olsen í sínum vi›merkingum.

Betri at leiga

Hóast ta› alla tí›ina hevur veri› greitt, at sáttmáli skuldi gerast vi› Atlantic Airways, so hev›i vinnunevndin fund vi› Una Danielsen frá felagnum Scotia, i› fæst nógv vi› tyrluflúgving av hesum slagnum. Uni Danielsen setti millum anna› spurnartekin vi›, hví landi› skuldi binda seg til eitt felag og eina tyrlu í 10 ár. Nógvar broytingar henda á hesum økinum nú, og hann helt ta› tí vera betur at leiga eina tyrlu í fyrstu umfari.

Jørgen Niclasen uppl‡sti fyri nevndini, at ætlanin alla tí›ina hevur veri› at hava tænastuna á føroyskum hondum, og ta› er bara eitt føroyskt felag, sum fæst vi› tyrluflúgving. Jørgen Niclasen heldur ikki, at ta› hev›i veri› bíligari at gjørt sáttmála vi› eitt útlendskt felag.

Sáttmálin vi› Atlantic Airwas er galdandi í 10 ár. 10 milliónir eru settar av á fíggjarlógini fyri í ár, og sí›ani kostar sáttmálin umlei› 14 milliónir um ári› komandi tíggju árini.

Løgtingi› skuldi vi›gera máli› vi› a›ru vi›ger› á fundinum í gjár.

Skúlast‡rini fáa ein møguleika afturat

Fleiri tingmenn í mentanarnevndini skjóta upp, at fólkavaldu skúlast‡rini halda fram eftir 1. august næsta ár. St‡rini skulu samstundis ví›kast vi › umbo›um fyri foreldrini, men tey fáa ongan atvkø›urætt í st‡runum

FÓLKASKÚLIN

Magnus Dam

Tingmenn í mentanarnevndini skjóta upp, at fólkavaldu skúlast‡rini halda fram eftir 1. august næsta ár

Skipanin vi› teimum fólkavaldu skúlast‡rinum eigur at halda fram, hóast løgtingi› hevur samtykt, at skipanin skal ni›urleggjast og skiftast út vi› eina a›ra 1. august næsta ár. Hetta halda allir tingmenn í mentanarnevndini hjá løgtinginum uttan Annita á Frí›riksmørk og Katrin Dahl Jacobsen.

Sambært n‡ggju fólkaskúlalógini skulu fólkavaldu skúlará›ini, sum eru í hvørjari kommunu, ni›urleggjast og skiftast út vi› eitt st‡ri fyri hvønn skúla sær. Foreldur skulu veljast í st‡rini saman vi› umbo›um fyri skúlan og kommunust‡ri› í kommununi. Ætlanin var, at hendan broytingin skuldi koma í gildi 1. august næsta ár. Men fáa teir fimm tingmenninir í mentanarnevndini sín vilja, so ver›ur hetta av ongum.

Halda fram í broyttum líki

Tingmenninir halda, at ta› er skeivt at avtaka fólkavaldu st‡rini og mæla til, at tey halda fram í broyttum líki. Tríggir ella fimm limir skulu veljast á kommunuvalinum, og harumframt skulu tvey foreldur, skúlalei›arin og eitt umbo› fyri lærararnar hava sæti í st‡rinum. Talan ver›ur altso um st‡ri vi› sjey ella níggju limum, men ta› ver›a bert teir fólkavaldu limirnir, sum fáa naka› avgerandi at siga í st‡runum. Hinir limirnir skulu ikki hava atkvø›urætt sambært uppskotinum hjá tingmonnunum.

Eitt av endamálunum vi› n‡ggju fólkaskúlalógini og n‡ggju skúlast‡runum var annars at styrkja um ávirkanina hjá foreldrunum. Men hesa ávirkanina fáa tey bert, um tey lata seg stilla upp til skúlast‡rini á kommunuvalinum.

Uppskotsstillararnir siga, at mong ivast í, um ta› er rætt at avtaka fólkavaldu skúlast‡rini, og teir hava lurta› eftir hesum sjónarmi›unum. Serliga í Tórshavnar kommunu, har ta› eru sjey og ver›a átta fólkaskúlar 1. januar næsta ár, hevur mótstø›an móti n‡ggju skúlast‡runum veri› stór. Í Havn hava allir partar mælt til at var›veita eitt felags st‡ri fyri allar skúlarnar, siga tingmenninir.

Tingmenninir eru samdir í, at verandi skipan er munandi lættari, tí nú ver›a st‡rini vald samstundis og eftir somu skipan sum kommunust‡rini.

Millumloysn

Ver›ur uppskoti› samtykt, so er talan er um eina millumloysn millum verandi skipan og skipanina, sum ætlanin var at seta í verk 1. august, siga tingmenninir.

- Samstundis sum vit var›veita fólkavaldu umbo›ini, fáa vit stu›la› upp undir foreldraávirkanina á skúlarnar, siga tingmenninir.

Sambært uppskotinum skal eitt foreldrará› stovnast á hvørjum skúla, og úr hesum foreldrará›num skulu finnast tveir limir, sum skulu luttaka í arbei›inum í skúlast‡runum – tó uttan atvkø›urætt.

Tingfólk lítlan hug at fara rættarvegin

Áhugin fyri at finna einstøk mál burturúr grein 19 frágrei›ingini til at leggja fyri rættin tykist lítil millum limirnar í Rættarnevnd Løgtingsins

§ 19 FRÁGREI‹INGIN
John Johannessen

Annita á Frí›riksmørk úr Tjó›veldisflokkinum vil hava, at grein 19 frágrei›ingin um 80 árini skal fáa rættarliga avlei›ingar. Men fleiri limir í Rættarnevndini halda, at varligari skal farast fram.

Eingir persónar

Rúna Sivertsen, sum umbo›ar Fólkaflokkin í Rættarnevndini, ivast í, um hon sum politikari eigur at leggja seg eftir at finna fólk at leggja sak ímóti.

– Eg haldi ikki, at vit politikarar skulu leita eftir persónum at leggja sak ímóti, uttan at vit finna út av, at okkurt heilt kriminelt er fari› fram, sigur Rúna Sivertsen.

Í hesum sambandi vísir fólkaflokskvinnan á, at rætturin hevur veri› upp í fleiri málum um førda politikkin í áttatiárunum, uttan at rætturin hevur kunna› sta›fest naka› beinlei›is lógarbrot.

Kortini ætlar Rúna Sivertsen sær at vi›gera grein 19 frágrei›ingina gjølla í Rættarnevndini, og hon fer at taka stø›u út frá vi›ger›ini.

Rættarnevndarlimir ivast í, um ta› er rætt at fara at leita eftir persónum í grein 19 frágrei ›ingini

Krevur umhugsunartí›

Hans Pauli Støm úr Javna›arflokkinum hevur enn ikki tiki› stø›u til grein 19 frágrei›ingina.

– Eg haldi ta› vera ney ›ugt at vi›gera frágrei›ingina í størsta álvara í Rættarnevndini, á›renn eg kann taka stø›u til, hvørjar avlei›ingar fágrei›ingin eigur at fáa, sigur Hans Pauli Strøm.

Hans Pauli Strøm ger greitt, at hann fer at taka vi›gerina í Rættarnevndini í størsta álvara. Tí talan er um eina ógvuliga álvarsama frágrei›ing. Og undir vi›ger›ini fer hann at taka stø›u til, hvørjar avlei›ingar, hon skal fáa.

– Eg ætli mær ikki at rí›a á nøkrum hesti í hesum máli. Eg fari ikki at fei›a naka› undir teppi›, og eg ætli mær heldur ikki at heingja nakran, sigur Hans Pauli Strøm.

Hyggja frameftir

Sámal Petur í Grund úr Sjálvst‡risflokkinum er forma›ur í Rættarnevndini. Hann ásannar, at frágrei›ingin vísir á fleiri vi›urskifti, har skeivt var› fari› fram í áttatiárunum.

Men samstundis vísir Sámal Petur í Grund á, at hesi mál eru fyrna›. Og tí heldur hann, at frágei›ingin heldur eigur at fáa fylgjur fyri lóggávu og mannagongdir í framtí›ini.

– Vit fara at vi›gera frágrei›ingina í størsta álvara. Men vit fara ikki at leita eftir einstakum málum í henni, sigur og ger samstundis greitt, at vi›ger›in í Rættarnevndini ver›ur út frá uppskotinum frá formansskapinum, i› sigur, at frágrei›ingin skal takast til eftirtektar.

Mogens Nepper Christensen, fúti, hevur víst á, at ákærumyndugleikin ikki ætlar sær at taka stø›u til frágrei›ingina sum eina heild. Men at ákærumyndugleikin kann taka stø›u til einstøk mál, um onkur vísir á tey.

Samstundis hevur fútin gjørt greitt, at fyrningarfreistin er 10 ár.

Annlis skal samskipa tingmanningina

Tjó›veldisflokkurin hevur nú tveir skrivarar. Ronnie Thomassen er floksskrivari og Annlis Bjarkhamar er júst sett í starv sum skrivari hjá tingmanningini

UMSITING
John Johannessen

26 ára gamla Annlis Bjarkhamar tók t‡skvøldi› av tilbo›num um at gerast skrivari hjá tingmanning Tjó›veldisfloksins.

Annlis Bjarkhamar hevur seinastu tr‡ árini veri› virkin í politiska arbei›i Tjó›veldisfloksins. Hon var vi› til at endurreisa Unga Tjó›veldi fyri trimum árum sí›ani, og hevur hon sí›ani veri› forma›ur í landsnevnd felagsins.

26 ára gamla Annlis Bjarkhamar er sett í starv sum skrivari hjá tingmanning Tjó›veldisfloksins

Mynd Jens Kr. Vang

Ungdómurin framat

Ta› var formansskapurin í Tjó›veldisflokkinum, sum heitti á Annlis um at taka vi› starvinum, og eftir drúgva umhugsunartí› tók hon vi›.

– Eg havi havt nógv beinlei›is samband vi› flokkin seinastu árini. Av tí, at eg havi veri› landsforma›ur í Unga Tjó›veldinum, havi eg eisini veri› umbo› fyri Unga Tjó›veldi› í sjálvum Tjó›veldisflokkinum. Tjó›veldisflokkurin letur nevniliga ungdómin sleppa framat, sigur Annlis Bjarkhamar.

N‡ggi skrivarin vísir á, at júst ta›, at hon hevur havt nógv samband vi› flokkin, og at flokkurin letur ungdómin sleppa framat, viga›i nógv, tá hon gjørdi av at taka vi› starvinum.

Skal vera bindili›

Uppgávan hjá Annlis Bjarkhamar sum skrivari hjá tingmanning Tjó›veldisfloksins er í høvu›sheitum at vera bindili› millum tingmanningina og restina av politiska heiminum í Føroyum.

Harafturat skal Annlis vera skrivari á øllum fundum hjá tingmanningini umframt, at hon skal hava eina opna skrivstovu á Gamla Apoteki.

Annlis fer at brúka tí›ina fram til jóla og nakrar dagar eftir jól til at seta seg inn í uppgávurnar, n‡ggja starvi› hevur vi› sær.

Umframt Annlis Bjarkhamar, sum nú er skrivari hjá tingmanningini, er Ronnie Thomassen skrivari hjá sjálvum Tjó›veldisflokkinum.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.

Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.



299,-

Jógvan Arge